# VØRUMESSAN 2001

## í Ítróttarhøllini á Hálsi 14.-16. september

VØRUMESSAN 2001




Sí innlegg í Sosialinum hósdagin 13.09

Sosialurin




# Clickhaze við útgerð fyri 25 milliónir

**Clickhaze tók í farnu viku upp í Lundgaard Studio, ið hevur útgerð fyri 25 mió. krónur, og tað gekk væl hjá bólkinum. Tøkningur var bretin David Hyatt, ið m.a. stóð sínar lærudagar í arbeiði við kenda Allan Parsons**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*



*Limirnir í Clickhaze hava tikið upp í Lundgaard Studios, ið hevur útgerð fyri 25 milliónir krónur. Eisini er kendur tøkningur við og bólkurin hevði kokk, ið hevði matin til reiðar í góðu hølunum í gamla bóndagarðium nærhendis Esbjerg*

*(Mynd: D. Olsen)*

Tað gekk væl hjá Clickhaze, sum farnu viku tók upp í Lundgaard Studio. Hetta er høvuðsvinningurin til Prix Føroyar finaluna, sum bólkurin vann. Mentamálastýrið lat vinningin, ið var ein vika í upptøkuhølunum við trimum máltíðum íroknaðum dagliga. Tó rindar Norðurlandahúsið ein part.

### Dugnaligur tøkningur

Sosialurin prátaði við bólkin, meðan hann var í upptøkuhølunum. Jón Tyril úr Clickhaze sigur úr Lundgaard Studio, at umstøðurnar eru av teimum allar bestu.

— Super! Hetta er gamal bóndagarður, ið nú er gjørdur til upptøkuhølir. Her eru allir hentleikar og eisini góðir møguleikar til hvíld og at taka sær av løttum, sigur Jón Tyril væl nøgdur, og leggur afturat, at ein kokkur er, ið tekur sær av matgerðini.

Lundgaard Studios liggja millum Kolding og Esbjerg. Hølini teljast avgjørt millum tey bestu í Danmark og útgerð er fyri eini 25 milliónir krónur. Tá eru guitarar, forstyrkjarar og slíkt ikki roknað við.

Tøkningur hjá Clickhaze hesa vikuna, ið upptøkurnar fóru fram, var bretski David Hyatt, ið sigst vera dugnaligur. Hann var á yngri árum m.a. í samstarvi við Allan Parsons, ið er kendur við sínum Allan Parsons Projekt. Mong kenna helst lagið Eye in the Sky og onnur.

### Læra nógv

Jón Tyril sigur, at fleiri av limunum í Clickhaze hava ikki royndir í upptøkuhølum. Fleiri hava als ikki roynt at starva í upptøkuhølunum áður.

– Í upptøkuhølunum er ein rættiliga »nakin«, sigur hann.

Limirnir í Clickhaze eru vanir at spæla á palli og at spæla saman, men ikki at taka upp og at standa hvør í sínum rúmi og so framvegis.

– Vit læra sera nógv, men fáa eisini okkurt í kassan. Her fáa vit eisini líkasum eina aðra mynd av tónleikinum, sigur Jón.

Hóast vantandi rutinu, so vænta limirnir í bólkinum at fáa minst 3 løg liðug. Hesi skulu nýtast til eina demofløgu.

– Kanska vit so fáa onkran at fíggja eina veruliga fløgu, sigur Jón, ið tó ikki vísir aftur, at talan møguliga verður um eina singlefløgu ella EP til jóla.

### Góð sambond

Á ferðini í Danmark hava limirnir í Clickhaze eisini fingið sambond við fleiri fólk innan tónleikaheimin.

Eitt úrslit av vitjanini á Nibe festivalinum, ið eisini kom við Prix finaluni, var vinalag við Peter Møller Madsen frá Nibe festivalinum, ið dámar Clickhaze sera væl. Hann hevur roynt at geva Clickhaze eina hjálpandi hond á ferðini innan danska tónleikaheimin. Hann hevur m.a. tosað um bólkin við fleiri fólk.

Soleiðis hevur ein frá Agency Group hoyrt Prix Fløguna og sagt, at Clickhaze er sera áhugaverdur bólkur.

– Hann helt, at Clickhaze var feitt, sigur Jón Tyril.

Sostatt er her ein booking maður, ið hevur áhuga í Clickhaze og sum bólkurin skal tosa nærri við. Hvat víðari hendir við hesum, og øðrum sambondum, vil tíðin vísa.

Clickhaze tók upp í Lundgaard Studios til og við sunnudagin.

# Hava nú stevnt Landsstýrinum

**Fyribils eru 10 kommunur uppi í stevningini, sum varð latin dómaraskrivstovuni hósdagin**

STEVNING
*Áki Bertholdsen*



*– Vit hava onki ímóti at hjálpa, men vit vilja hava staðfest um tað ber til at taka peningin uttan víðari, sigur Eivind Jacobsen, borgarstjóri á Strondum*

Hevði Landsstýrið heilmild til at brúka peningin úr Kommunala Veðhaldsgrunninum til at niðurskriva skuld hjá teimum ringast staddu kommunum í Føroyum, uttan at kommunurnar høvdu játtað tað frammanundan?

Ella var tað ólóglig ognartøka?

Hesin spurningurin verður nú endaliga svaraður.

Við stuðuli frá sjey kommunum, hava Sjóvar-Gjáar- og Kirkjubøar Kommuna nú stevnt Landsstýrinum eftir teirri upphæddini, sum tey mistu, tá ið peningur í Kommunala Veðhaldsgrunninum varð brúktur til at hjálpa teimum mest skuldarbundu kommununum við.

Tey sjey kommunurnar, sum eru uppi í sakarmálinum og sum taka fíggjarliga ábyrgd av tí saman við teimum trimum, sum stevna, eru Sumbiar-, Miðvágs-, Nes-, Hósvíkar-, Sunda-, Svínoyar- og Skúvoyar Kommuna.

Tær halda at tað var ognartøka, tá ið Landsstýrið ístaðin fyri at betala teimum peningin aftur, brúkti hann til at niðurskriva skuldina hjá teimum ringast støddu kommununum við.

Fáa kommunurnar viðhald, fara helst fleiri kommunur eisini at stevna. Eivind Jacobsen á Strondum, ið saman við Sofus Johannesen við Gjógv og Anfinni Brekkstein á Velbastað, hevur arbeitt við málinum fyri kommunurnar, sigur, at tað eru bara tvær kommunur, sum beinleiðis hava boðað frá, at tær eru ikki sinnaðar at vera uppi í sakarmálinum og tað eru Bíggjar- og Viðareiðis kommuna.

Hann sigur, at hjá Strondum snýr tað seg um eina milión, sum tað snýr seg um og tilsamans er kravið frá teimum trimum kommununum 1,2-1,3 millión.

Men tapir Landsstýrið, noyðist tað eisini at betala hinum kommununum sín part og so verður talan um fleiri milliónir og tær fara ivaleyst at gera mun í onkrum kommunukassa.

Eivind Jacobsen leggur dent á, at hetta er ikki gjørt, tí kommunurnar ikki vildu hjálpa teimum illa støddu kommunum.

Men hetta er eitt prinsippmál, um Landsstýrið hevur rætt til at taka pening hjá kommununum.

– Vit vilja hava tað staðfest, um tað er loyvt at taka peningin og tí hava vit lagt málið fyri dómstólarnar fyri at vita, hvussu vit skulu bera okkum at einu aðruferð, sigur hann.